

TALGILDU FØROYAR
01100110 01101111

# Talgildingin av samfelagnum heldur fram

**Heildarætlan fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2023 – 2025**



# **Innihalds**yvirlit

Saman um einar talgildar Føroyar . . . . . 4

Meginreglur fyri talgildingini . . . . . 6

**VISIÓN 1:** Ein felags myndugleiki við føstum íløgukarmi . . . . . 9

**VISIÓN 2:** Samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu . . . . . 13

**VISIÓN 3:** Munadyggur almennur geiri . . . . . 21

**FYLGISKJAL:** Íløguætlan fyri árini 2023-2025 . . . . . 26

# **Saman** um einar **talgildar Føroyar**

**Við hesari heildarætlan fyri 2023-2025, er tað visiónin, at talgilding framhaldandi verður eitt týðandi amboð at skapa vøkstur og at framtíðartryggja vælferðina, og samstundis tálma almennu útreiðslunum. Heildarætlanin er framhald av ætlanini fyri 2016-2020, og er grundað á niðurstøðurnar hjá KST arbeiðsbólkinum í Vakstrarforum.**

Føroyar hava ment seg nógv, síðan sjøtul varð settur á fyrstu heildarætlanina fyri talgilding av samfelagnum í 2015. Vit hava í dag eitt fyrstafloks undirstøðukervi, sum er grundarlagið undir talgilding tænastum frá almennum eins væl og privatum tænastuveitarum.

Samleikin og Vangin eru vorðin fólkaogn. Útvið 40.000 fólk hava fingið sær Samleikan og harvið atgongd til tað vaksandi talið av tænastum sum brúka Samleikan at eyðmerkja fólk við á Vanganum. Heldin er grundarlagið undir flutningi av dátum úr og millum almennum skráum. Grundardáturnar: Fólkayvirlit, tinglýsing, matrikul og kortdátur eru lættari atkomuligar og ókeypis at brúka, og ein føroysk virkisskrá verður skjótt veruleiki.

Hesi átøk gera tað lætt og skjótt hjá borgarum, vinnu og myndugleikum at samskifta á ein tryggan, einfaldan og nútímans hátt. Mannagongdir eru lættari og effektivari, og orka leysgivin í umsiting yvirhøvur. Við hesum eru lunnar lagdir undir framtíðar menning og vøkstri.

Hetta hevur latið seg gjørt, orsakað av politiskum vilja og framsøkni, einum breiðum samstarvi millum land, kommunur og vinnu, og tí borgarar og starvsfólk í stóran mun hava verið búgvin og klár til stóru broytingar, sum talgilding hevur við sær.

Næsta stigið á leiðini er at gagnnýta og fáa fullu nyttu av undirstøðukervinum.

1//

## Ein felags myndugleiki við føstum íløgukarmi

Í fyrstu heildarætlanini var eitt av aðalmálunum, at land, kommunur og vinna samstarvaðu um uppgávuna at talgilda samfelagið. Nú er málið at fara eitt stig longri og seta á stovn ein myndugleika, ið stendur fyri yvirskipaðu talgildingini. Skulu vit framhaldandi menna okkara vælferðarsamfelag, er neyðugt, at land og kommunur áseta ein fastan íløgukarm til talgilding, sum tryggjar støðufesti og framhaldandi menning av vælferðarsamfelagnum.
Myndugleikin samstarvar við vinnuna, so alt samfelagið fær ágóðan.

2//

## Samanhangandi talgildar tænastur fyri borgarar og vinnu

Vangin veitir borgarum tænastur frá øllum geirum: Landi, kommunum og vinnu. Heildarætlanin leggur høvuðsdent á, at fáa tænastur, sum ganga tvørturum geirar, at hanga betri saman. Serlig atlit verða tikin til at fáa heilsudátur og -tænastur atkomiligar talgilt.
Vinnan skal hava góðar møguleikar at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna talgilt. Við einum virkisvanga fer tað at bera til hjá vinnuni at fáa líknandi tænastur, sum vit kenna á Vanganum.

3//

## Munadyggur almennur geiri

Fyrisitingarligar uppgávur og mannagongdir skulu framhaldandi effektiviserast. Heildarætlanin leggur upp upp til at menna talgilda tinglýsing, sum ikki varð gjørd liðug í fyrstu heildarætlanini.
Vit skulu eisini fyrireika okkum til eitt samfelag við fleiri tólmennum, tilgjørdum viti, talukennara og aðrari tøkni. Vit skulu tora at vera nýskapandi. Hetta krevur karmar, so vit framhaldandi hava tamarhald á tøknini.
Neyðugt er at gera eina langtíðar-ætlan fyri, hvussu vit brúka hesa tøkni.
Hesar visiónir verða lýstar nærri á komandi síðunum.

# Meginreglur fyri **talgildingini**

Eins og í heildarætlanini 2016-2020 skal arbeiðið grundast á meginreglur, sum eru afturvendandi í øllum átøkum og verkætlanum, sum verða ment og sett í verk.



## TALGILDING FYRI ØLL

Talgilding hevur broytt okkara gerandisdag. Samstundis sum fleiri og fleiri tænastur gerast talgildar, setast nýggj krøv til borgarar um loysnir, trygd og førleikar. Tað, sum er lætt fyri nøkur, er torført fyri onnur. Talgildar loysnir skulu mennast soleiðis, at allir borgarar kunnu verða við.

## DÁTUETIKKUR

Dátuetikkur snýr seg um, hvussu vit savna, brúka og deila dátur við virðing fyri siðum og virðing fyri einstaklinginum. Fyri at røkka fyrimunum, sum fáast við nýtslu av dátum, skulu etiskir spurningar viðgerast áðrenn skipanir verða mentar. Vit skulu taka hædd fyri rættindum, rættartrygd og samfelagsvirðunum hjá borgarum.

## BORGARIN Í MIÐDEPILIN

Almennir myndugleikar skulu samstarva um menningina av talgildum tænastum. Borgarin skal vera í miðdeplinum av talgildu vælferðini. Tað skal vera minni súluhugsan og meira borgarahugsan.

## VIT SAMSTARVA OG DEILA VITAN

Tá ið vit talgilda, tryggja vit, at okkara vitan og loysnir verða brúktar og endurnýttar tvørtur um geirar. Skipanir og funkur skulu endurnýtast og ikki enduruppfinnast. Vit eggja til at deila vitan og førleikar, so vit kunnu síggja nýggjar møguleikar og loysa samfelagsavbjóðingar í felag.

## UPPLÝSINGAR SKULU BARA LATAST EINA FERÐ

Myndugleikar skulu ikki krevja upplýsingar, sum longu finnast í almennum skráum. Hetta hækkar um dátugóðskuna og minkar um umsiting av skráum. Vit skulu liva upp til sokallaða *Once Only Principle.*

## BURÐARDYGD

Burðardygd og talgilding skulu hugsast saman. Talgilding setur stór umhvørvisspor, serliga í mun til dátuhýsing og viðgerð. Tí skulu krøv setast til innkeyp av KT loysnum, so fyrilit verður tikið fyri burðardygd og umhvørvi.

# VISIÓN 1:

# EIN FELAGS MYNDUGLEIKI VIÐ FØSTUM ÍLØGUKARMI



**Við einum felags myndugleika fæst sum mest burturúr landsins talgildingar tilfeingi. Málið er at seta á stovn ein myndugleika fyri talgilding av samfelagnum. Ein felags myndugleika fyri land, kommunur og grunnar, sum samstarvar við vinnuna, soleiðis at vit hava eina felags talgilda kós fyri samfelagið.**

Myndugleikin fær neyðugu heimildirnar at tryggja, at geirar og súlur ikki eru forðing fyri at veita borgarum og vinnu samanhangandi og effektivar talgildar tænastur, á sama hátt, sum vit kenna í grannalondum okkara.

Myndugleikin skal varða av verandi talgilda undirstøðukervi. Hann skal standa fyri at leggja ætlanir fyri talgilding av samfelagnum, samskipa yvirskipaðu átøkini og orða og stinga út í kortið, m.a. leið- og meginreglur fyri kt-arkitekturi, brúkaravinsemi og standardiseringum. Eisini hevur hann umsjón við, at lógir og trygdarkrøv verða hildin.

Virksemið, sum fer fram á stovnum hjá landi og kommunum innan KT og talgilding, tørvar betri samskipan. Vantandi samskipan og samstarv hevur við sær, at samfelagsgagnið av teimum íløgum, sum verða gjørdar í KT og talgilding, kundi verið munandi størri. Meira kann gerast burturúr felags átøkum innan innkeyp, menning og rakstri, soleiðis at sum mest fæst fyri íløgurnar, og at gagnið av átøkunum verður størri.

Fyri at tryggja støðufesti og framhaldandi menning av talgilda undirstøðukervinum er neyðugt, at land og kommunur áseta ein fastan íløgukarm til talgilding. Hesin skal grundast á leypandi heildarætlanum sum hesari. Íløgukarmurin skal umsitast av myndugleikanum fyri talgilding og verða fyri fleiri ár í senn. Eisini skal játtanarskipanin broytast soleiðis, at stovnar kunnu avskriva KT íløgur.

Grundarlagið fyri einum slíkum myndugleika finst í stóran mun longu í dag, serliga við funksjónum hjá Gjaldstovuni: KT-Landsins og Talgildu Føroyar. Her finnast bæði førleikar og royndir at standa fyri felags-almennari leiðslu-, menning- og rakstri- av KT og talgildingar uppgávum.

**1. ÁTAK**

### Myndugleiki fyri talgilding setast á stovn

Landsstýrið tekur upp samskifti við kommunurnar um at seta á stovn myndugleika við heimildum fyri land og kommunur. Samskiftið skal somuleiðis takast við vinnuna um teirra leiklut og ágóða. Síðani skal arbeiðsbólkur frá luttakandi geirum allýsa vavið og karmarnar fyri nýggja myndugleikanum. Myndugleikin skal skipast við lóg, sum verður gjørd í sambandi við allýsingina.

**2. ÁTAK**

### Ein fastan íløgukarm

Landsstýrið og kommunurnar áseta í felag ein fastan íløgukarm fyri talgilding sum part av arbeiðinum við nýggjum myndugleika fyri talgilding.

**3. ÁTAK**

### Broyta játtanarskipan

Játtanarskipanin verður broytt. KT-menning verður eitt slag av játtan á fíggjarlógini. Stovnar skulu kunna avskriva KT-íløgur.

**4. ÁTAK**

### KT í lóggávu

Endamálið er, at KT og lóggáva skulu hugsast saman. Tá ið lógaruppskot verða gjørd, skal metast um, hvussu lógin skal umsitast við KT, umframt at galdandi lóggáva skal eftirmetast og dagførast, so hendan ikki er ein forðing fyri talgilding. KT-menning og lógararbeiði skulu hugsast saman, so lóggávan stuðlar undir talgilding í samfelagnum. Lóggáva skal verða nøktandi í einum heimi, har tøknin skjótt kann broytast. Í lógararbeiðinum skal metast um, hvussu lógin skal umsitast við KT.

**5. ÁTAK**

### Útbreiðsla av P-talinum

Privata vinnan skal, eins og almennir myndugleikar, kunna brúka P-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta er ein fortreyt fyri, at vinnan kann fáa størri gagn av m.a. Samleikanum, Hetta ger talgildingina tryggari og munadyggari fyri alt samfelagið.

**40.000**
*SAMLEIKAR*

*august 2022*

**2,2 mió**
*Innritanir*

**10.000-15.000**
INNRITANIR
Í MIÐAL
UM DAGIN

## VISIÓN 2:

# SAMAN-HANGANDI TÆNASTUR FYRI BORGARAR OG VINNU




## Samskifti og veitingar til borgarar og vinnu skulu verða smidligari og skjótari.

Flestallar almennar- og kommunalar tænastur verða tøkar á Vanganum og geva borgarum eina alsamt meira samanhangandi brúkaraferð, størri gjøgnumskygni og betri tænastu. Talgilding av heilsudátum og -tænastum verður eitt aðalmál.

Ein virkisvangi verður mentur. Her fær vinnan atgongd til upplýsingar, sjálvgreiðslur og samskifti.

Eitt talgilt borgarakort skal mennast, sum fólk skjótt og trygt kunnu eyðmerkja seg t.d. á Apotekinum, í Rúsdrekkasøluni ella í sambandi við gongd í haga.

Brúkaraferðir grundaðar á lívsstøður skulu allýsast og greinast, so vit fáa meira samanhangandi tænastu, og borgarar eru betur fyri at sjálvi at avgreiða síni viðurskifti tvørturum myndugleikar.

### 6. ÁTAK:
### Samanhangandi tænastur

Góð brúkarauppliviIsir gera tað lættari hjá borgarum og vinnu at brúka talgildar sjálvgreiðslur. Tað er eisini týðandi, at loysnirnar lúka krøv um fyrisiting og trygd.

Tænastulandslagið hjá landi og kommunum skal greinast og allýsast. Út frá lívsstøðum og innliti í tørvin hjá borgarunum skulu fleiri tænastur mennast, sum eru lættar at skilja og brúka. Ein raðfesting verður gjørd, so tænasturnar verða mentar til tørvin hjá borgaranum og samstundis lætta um almennu fyrisitingina.

Eitt greitt yvirlit yvir brúkaraferðina skal vera til taks, so borgarin kennir seg tryggan við krøv og rættindi. Tá ið borgarar hava tørv á hjálp skulu tey lætt vita, hvar tey venda sær.

Tá ið tænastur gerast tøkar á Vanganum, fáa borgarar betri yvirlit yvir brúkaraferðir. Alsamt fleiri persónligar upplýsingar skulu gerast tøkar, eins og tænastur grundaðar á samtykki skulu gera tað lættari hjá borgaranum at avgreiða viðurskifti við fleiri tænastuveitarar í somu brúkaraferð, t.d. sjúkradagpengar, har borgari, lækni, arbeiðsgevari og Almannaverkið eru partar av somu brúkaraferð.

### 7. ÁTAK:
### Savna tænastur til vinnuna

Ein virkisvangi verður mentur, soleiðis at vinnan kann fáa atgongd til dátur og sjálvgreiðslur frá almennum tænastuveitarum. Virkisskráin verður grundarlag undir hesum virkisvanga eins og fólkayvirlitið er fyri Vangan.

Umfatandi greiningar og raðfestingar skulu gerast av tænastunum, so tær nøkta tørvin hjá vinnuni og lætta um fyrisitingina.

Við **einum** felags loysn til vinnuligar sjálvgreiðslur verður tað lættari hjá feløgum, at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna á einum stað. Sjálvgreiðslurnar verða mentar eftir einum felags leisti so tær eru lættari at kenna aftur.

**620.000**

*brøv í* ***MÍNBOKS*** *í 2021*



### 8. ÁTAK:
### Talgildan postkassa til øll

Borgarar, vinna og tað almenna kunnu trygt og einfalt samskifta sínámillum. Hetta krevur at at lóg um almennan postkassa verður gjørd, sum javnsetur talgilda postkassan við tann, ið hongur á húsavegginum.

Mínboks skal dagførast til at kunna handfara økta samskiftið, har vinnan fær gjørt nýtslu av Mínboks, bæði sum avsendari og móttakari. Eisini skulu foreldur og verjar kunna standa fyri brævasamskiftinum hjá sínum børnum.

Mínboks skal eisini tillagast, so hon umframt post kann verða skjalagoymsla fyri alskyns týðandi skjøl, sum navnabræv, prógv frá lærustovnum og faðirskapsváttan.

### 9. ÁTAK:
### Ein bankakonta til almennar veitingar

Borgarar og vinna kunnu á einum stað upplýsa sína bankakontu, sum verður brúkt til almennar veitingar og rokningar. Borgarar umsita hetta á Vanganum og vinnan á virkisvanganum.

Talan er um **eina** bankakontu, sum borgarin ella vinnan hevur frammanundan, og sum tað almenna brúkar til at útgjalda almennar veitingar.

Almennir myndugleikar hava skyldu at halda sínar skipanir dagførdar við hesum upplýsingum. Hetta tryggjar at borgarin bara skal venda sær eitt stað, tá nakað skal broytast, og at allar almennar skipanir hava dagførdar dátur.

### 10. ÁTAK:
### Talgilding innan heilsu og fyribyrging

Dátur og tænastur frá heilsuverkinum eru tøkar á Vanganum, so yvirlit um tína heilsu er savnað á einum stað.

Hetta er ein tilgongd, har serligt atlit verður tikið fyri viðkvæmu persónsupplýsingunum og álitið frá borgarunum. Á Vanganum verða dáturnar einans vístar, og tað er framhaldandi heilsuverkið, ið viðgerð og varðar av dátunum.

Heilsuverkið kallar fólk inn til viðtalur í kalendaranum á Vanganum. Í hesum sambandi fáa borgarar áminningar sendandi, so talið av viðtalum har eingin møtir upp lækkar. Eisini kunnu borgarar bíleggja sær tíð hjá m.a. læknum og viðgerðarstovnum beinleiðis á Vanganum.

# VANGIN GER TAÐ LÆTTARI

- *innlit í persónliga skrásettar dátur*
- *persónligan kalendara, sum vísir avtalur og freistir*
- *nógvar sjálvgreiðslur til m.a. at senda umsóknir*
- *trygt samskifti umvegis Mínboks*
- *yvirlit yvir viðgerð av málum*



Møguleikin fyri videoviðtalum hjá lækna, fysio- og ergoterapeuti osfr. skal greinast. Hetta lættur um hjá borgarum og heilsustarvsfólkum. Hetta økir eisini um tænastuna hjá fólki uttan fyri miðstaðarøkið. Tryggjast skal, at tøkniligu karmarnir liva upp til trygdarkrøv og lóg um dátuvernd.

Fleiri upplýsingar eru tøkar á Vanganum. Eitt nú skulu barnakonur fáa innlit í sína vandrejournal, yvirlit yvir koppsetingar eru til taks, og hvør er skrásettur sum avvarðandi.

Í samband við ávísa viðgerð, senda borgarar upplýsingar um t.d. blóðtrýst, vekt og hjáárin av heilivági beinleiðis og trygt til heilsuverkið. Hetta lættir munandi um núverandi mannagongd, og ger avgreiðsluna skjótari.

Tað skal vera møguligt og lætt at søkja um fleiri umsorganartænastur, so borgarin kann verða sum longst í egnum heimi.

## 11. ÁTAK:
### Borgara- og koyrikort

Talgilt borgara- og koyrikort verður ment sum app. Eftirspurningur hevur leingi verið eftir talgildum koyrikorti. Forkanning hjá Akstovuni og Talgildu Føroyum vísti á fleiri fyrimunir við at menna tað saman við talgildum borgarakorti. Appin er ætlað borgarum, tá teir skulu eyðmerkja seg, tá teir møta upp í ymsum samanhangum, t.d. at prógva aldursmark.

Fyrstu útgávu av talgilda borgara- og koyrikortinum verður liðug í 2023. Síðani verður farið undir at knýta í fakskipanir, sum t.d. bókhaldsskipanir, soleiðis at ein uppmøting kann verða skrásett beinleiðis í hesar skipanir, og møguliga verða bókað alt eftir um uppmøtingin hevur kostnað við sær. Lógarkarmarnir skulu tillagast nýtsluna av borgarakortinum.

Stórt gagn er í at talgilda uppmøting í ymsum samanhangum. Í staðin fyri at hvør áhugapartur skal menna sína egnu loysn (t.d. at SSL mennir sítt egna kort, kommunurnar sítt) gagnnýta vit sama kort og sama infrastruktur til alt samfelagið. Í hesum eru stórar sparingar at heinta.

## 12. ÁTAK:
### Talgilt val

Møguleikarnir innan talgild val eru stórir, heilt frá at sita við hús og atkvøða talgilt til løgtings- og kommunualval, til stigvísa talgilding av valtilgongdini, har talgilding av valkortinum kundi verið fyrsta stig. Møguleiki er eisini at brúka tøknina til at gera hoyringar í kommunum og áhugafeløgum.

Forkanning verður gjørd um talgilt val í Føroyum. Allir týðandi áhugapartar luttaka og verða hoyrdir. Atlit verður tikið fyri okkara sterku fólkaræðisligu virðum. Kanningin skal lýsa allar møguleikar fyri talgilding av valtilgongdini. Úrslitið verður latið politisku skipanini sum eitt tilmæli.

# Í FØROYUM BÚGVA *august 2022*

**44.362**
*fólk í aldrinum 13 ár og eldri*

**40.000**
*av teimum hava fingið sær Samleikan*

### 13. ÁTAK:
### Fulltrú

Borgarar og vinna skulu lætt og trygt kunna lata onnur virka fyri seg í talgilda rúminum. Tað skal bera til at geva og umsita talgildar fulltrúir til øll viðurskifti við tað almenna. Ein miðsavnað fulltrúarloysn skal gerast, sum kann brúkast av øllum tænastuveitarum, sum veita talgildar tænastur.

Fyrisitingarlógini § 8, stk. 1. sigur, at tann persónur *„sum er partur í einum máli, kann til eina og hvørja tíð, tá málið verður viðgjørt, lata seg umboða av øðrum ella fáa hjálp frá øðrum.“* Týdningarmikið er, at borgarin ikki missir slík rættindi, tá viðgerðin frá almennu fyrisitingini gerst talgild.

**Fulltrúarloysnin skal loysa ymisk sløg av fulltrúum:**

- persónur, ið sjálvur kann geva fulltrú
- persónur, ið ikki sjálvur kann geva fulltrú, t.d. vegna likamligar ella sálarligar avbjóðingar ella vantandi sjálvræði
- virki, ið viðkomandi eigur ella er í starvi hjá
- virki, ið viðkomandi fremur uppgávur fyri, uttan at vera í starvi, t.d. grannskoðarar og sakførarar.

### 14. ÁTAK:
### Talgild inklusjón og menning

Talgilding er fyri øll, og vit liva í eini tíð, har alt meira samskifti og tænastur verður talgilt. Sum samfelag hava vit ábyrgd av, at allir borgarar kunnu klára seg í talgilda heiminum.

Ein samskiftisætlan skal gerast fyri talgilda inklusjón. Serligar vegleiðingar verða gjørdar til m.a. eldri borgarar og fólk, ið ikki eru stinn í KT og talgilding. Í hesum sambandi skulu brúkarakanningar gerast, sum vísa, hvørjar tær størstu avbjóðingarnar eru, og hvørji hjálpartól eru best fyri borgararnar.

Eisini skulu átak gerast fyri talgildari menning, sum lærir børn, ung og vaksin at virka í talgilda heiminum.

Fyri at tryggja at talgildingin verður fyri øll verður arbeitt á hesum mótum:

- **Talgild atkoma**
  Talgild atkoma fevnir um meginreglur og tøkni, sum talgildar heimasíður, appir og aðrar loysnir skulu lúka. Tá ið vit menna loysnir við talgildari atkomu, tryggja vit, at brúkarar, ið hava avbjóðingar við t.d. sjón,

hoyrn, rørslu, minni og farvu- og orðblindni, kunnu luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

- **Føroyskt og enskt**
  Tað er neyðugt, at hædd verður tikin fyri, at øll ikki duga føroyskt. Tí skulu allar loysnir vera umsettar til enskt, so eitt nú tilflytarar kunnu brúka tær.

- **Førleikar**
  KT førleikar skulu betrast hjá teimum, ið ikki duga ella føla seg trygg við tøknina. Øll skulu kunnu fáa frálæru, so tey menna førleikarnar at luttaka í talgilda samfelagnum.

- **Talukennari**
  Tólmenni og talgildar tænastur skulu verða tøkar við føroyskum talukennara. Hetta gevur serliga fyrimunir fyri fólk, ið eru t.d. hoyri- og sjónveik.

# SAMLEIKAR
býttir á kyn & aldur



# VISIÓN 3:

# MUNADYGGUR ALMENNUR GEIRI



**Talgilding og nýggj tøkni sum heild, skulu setast í verk fyri at skapa ein betri og munadyggari (effektivari) almennan geira. Tøknin er týðandi amboð fyri loysa vaksandi avbjóðingina við vantandi arbeiðsmegi á alsamt fleiri fakøkjum.**

Tøkni kann serliga lætta um tá talan er um einsháttaðar og tungar arbeiðsuppgávurt á fyrisitingarligum økjum og í heilsu- og eldrarøkt. Neyðugt er við nýhugsan, hvussu vælferðartænastur skulu veitast í framtíðini. Tøkni sum tilgjørt vit (AI), tólnet (IoT) og tólmenni (robot) eru lykilin til, at hetta kann eydnast.

Fyritreytirnar fyri at gera nakað munagott eru góðar. Vit hava fjarskiftiskervi í heimsflokki, bæði í mun til útbreiðslu og tøkni. Talgilda undirstøðukervið er nýmótans, ment til okkara tørv, við loysnum ið liva upp til altjóða krøv, og sum samfelagið alt ger brúk av.

Talan er um eina stóra uppgávu, sum krevur eitt haldgott samstarv millum myndugleikar og vinnu, har partarnir binda seg til at fremja neyðugu broytingarnar og skapa teir neyðugu karmarnar. Myndugleikar og starvsfólk skulu harumframt førleikamennast, og løgfrøðin skal stuðla undir einari ábyrgdarfullari nýtslu av nýggjari tøkni.

### 15. ÁTAK:
**Talgild Tinglýsing mennast**

Í heildarætlan 2016-2020 var ætlanin at menna og seta í verk eina talgilda tinglýsing, har borgarar og vinna (serliga peningastovnar og sakførarar), sjálvi kundu tinglýsa talgilt.

Tað eydnaðist ikki at koma á mál við hesum, orsakað av vantandi fígging. Nøkur nøkur grundleggjandi fyrireikandi stig vórðu tó sett í verk. Stóru goymslurnar við tinglýsingarskjølum vórðu ljóslisin og gjørd alment atkomilig á tinglysing.fo. Eisini var forkanning og kravfesting til eina fulla talgilda tinglýsing gjørd. Í 2022 er Umhvørvisstovan farin undir at greina, hvussu talgild innlating av tinglýsingarskjølum kann fara fram.

Talgild tinglýsing er tikið við aftur sum mál í hesi heildarætlan, tí nytturnar av hesum eru so stórar fyri samfelagið. Avgreiðslutíðin styttist munandi, tinglýsast kann alt samdøgrið, góðskan hækkar, og tað verða færri burturvísingar. Fyri borgarar hevur tað við sær skjótari útgjalding av láni, og fyri vinnuna (serliga peningastovnar) og tinglýsingarmyndugleikan (Umhvørvisstovuna) hevur tað møguleikar fyri effektivisering.

Umhvørvisstovan vil, saman við nýggja myndugleikanum fyri talgilding og øðrum viðkomandi áhugapørtum, samstarva tætt í tilgongdini at menna eina fullgóða talgilda tinglýsing.

### 16. ÁTAK:
**Nýggj tøkni, ið stuðlar undir effektivisering**

Saman við vinnu, kommunum, Sjúkrahúsverkinum, Fróðskaparsetrinum og øðrum relevantum áhugapørtum verður ein langtíðarætlan gjørd fyri hvussu vit á bestan hátt taka nýggja tøkni, so sum tilgjørt vit (artificial Intelligence) tólmenni (robotics) og tólnet (internet of things), í nýtslu.

Vit eru í triðju ídnaðarkollveltingini, og KT, talgilding og tøkni sum heild spæla ein størri og størri leiklut í øllum samfelagsviðurskiftum og kunnu verða við til at loysa fleiri av grundleggjandi avbjóðingum í okkara samfelagi.

Eyðsýnt er at Landið fær stórt gagn burturúr at taka nýggju tøknina í nýtslu. Automatisering av fyrisitingarligum uppgávum kann økja um góðskuna og spara tíð hjá myndugleikum. Tilgjørt vit kann effektivisera og betra góðskuna til m.a. screening av krabbameini og ger tað møguligt við persónligari medisinering.

Innan m.a. heilsu- og eldrarøkt eiga vit at hava dirvið til at royna tøknina saman við m.a. granskarum á Fróðskaparsetur Føroya og vinnuni. Um almenni og privati geirin, saman við granskingini, taka hesa avbjóðing á seg, kann Føroyar verða undangonguland í verkseting av ítøkiligum ágóðum av hesum nýggju tøkniligu kollveltingum.

**5920**
***TALGILDAR***
*undirskriftir*
*1. juli 2022*



# vangin

AKSTOVAN
apoteksverkið
almannaverkið
Íleguysavnið Genetic Biobank
RUNAVÍKAR KOMMUNA
SJÓVINNUSTÝRIÐ FAROESE MARITIME AUTHORITY
SUNDA KOMMUNA
TAKS
STUDNI
TÓRSHAVNAR KOMMUNA
umhvørvisstovan
TUNNIL

# samleikin

BANKNORDIK
BARN TÓRSHAVNAR KOMMUNA
betri banki
betri trygging
Gjensidige
mínrokning
NORÐOYA SPARIKASSI
LÍ
SJÚKRAHÚSVERKIÐ
Skráseting Føroya
SUÐUROYAR SPARIKASSI
TAKS VINNUGLUGGIN
TAKS BORGARAGLUGGIN
umhvørvisstovan

# SAMLEIKAR *juni 2022*

## Lutfalsliga undirtøkan um landið




**NORÐOYGGJAR *3.929*** *Samleikar*
**EYSTUROY *7.778*** *Samleikar*
**NORÐSTREYMOY *2.592*** *Samleikar*
**SUÐURSTREYMOY *14.836*** *Samleikar*
**VÁGAR *2.156*** *Samleikar*
**SANDOY *751*** *Samleikar*
**SUÐUROY *2.738*** *Samleikar*

**UTTANLANDS *3.828*** *Samleikar*

TALGILDU
**FØROYAR**
0 1 1 0 0 1 1 0   0 1 1 0 1 1 1 1

**Høvuðsskrivstovan**
Gjaldstovan
Kvíggjartún 1, FO-160 Argir
Tlf: +298 35 24 00
talgildu@talgildu.fo

**Brúkaratænastan**
Staravegur 9, 100 Tórshavn
Tlf: 1881
1881@talgildu.fo